# Lærarar við nógvum starvsárum á baki

STARVSDAGAR

Fyrsta august í ár hevði Regin av Steinum verið lærari í Argja skúla í 35 ár og Bjarni Samuelsen í 30 ár. Regin er 64 ára gamal og ættaður úr Kollafirði, meðan Bjarni er 57 ára gamal og úr Havn.

Í hesum sambandi bjóðaði skúlin til eitt borðhald fyri teimum, familjum og vinum og so eisini starvsfeløgunum. Við góðum føroyskum viðskera og okkurt at leska sær á, var sera hugnaligt at sita í vælupp-dekkaðari miðhøll og heiðra hesar báðar við sangi og talum. Ein hugnalig løta seinnapartin fríggjadagin í Argja skúla.

Í síni røðu kom Marjun Holm, skúlastjóri, inn á týdningin av stabiliteti á arbeiðsplássinum og tað serliga í eini verð, sum í løtuni er merkt av fólki, sum "zappa" runt úr einum staði í annað.

Eitt støðugfesti, sum skapar trygd og trivnað ikki minst fyri nýggjar lærarar, sum her hava møguleika at leita sær ráð og vitan. - Og so ikki minst um tað nærlagni, sum hesir báðir altíð hava lagt í sítt arbeiði. Fakligur førleiki og royndir eru eginleikar, sum ein skúli ikki kan vera fyri uttan.



*Regin av Steinum (v.m.) og Bjarni Samuelsen kundu tann 1. august hátíðarhalda, at teir hava arbeitt sum lærar við Argja skúla í ávikavist 35 og 30 ár*



*Regin av Steinum og konan Paulina við einum ommu- og abbabarni*



*Marjun Holm, skúlastjóri, og Bjarni Samuelsen*



*Formaðurin í skúlastýrinum Marita Simonsen og Regin av Steinum*



*Tveir starvsfelagar: Eyðun á Borg og Krisjan Christiansen*



*Bergur Slættalíð, húsavørður, og Búi Brattaberg, lærari við Argja skúla*